# Arbeiðsspurningar ”Tey við Gryvjuna”

- Ger stuttan samandrátt av søguni
- Hvussu halda tit lívið í Gryvjuhúsunum var, áðrenn børnini fluttu heimaífrá?
- Hvussu broyttist lívið eftir at børnini vóru farin?
- Hvussu bóru tey gomlu sína sorg?
  - Er ymiskt hvussu menniskju bera sína sorg?
- Hvussu vóru bygdarfólkini móti hjúnunum?
  - Hví vildu tey ikki siga teimum tíðindi um børn teirra?
- Hví fingu børnini í bygdini einki at vita um hjúnini?
  - Er hetta eitt vanligt fyribrigdi, at sumt verður tagt burtur fyri børnum? Hví?
- Hví fluttu gryvjubørnini ikki heim aftur í bygdina?
  - Hvat meta tit synirnir gjørdu uttanlands? Hví endaði ein við at drepa bróður sín?
  - Hvat halda tit dóttirin ger í Hull?
- Greiðið frá bygnaðinum í søguni.
  - Deil í partar
  - Hvussu er frásagnarstílurin?
  - Tíð
  - Stað
  - Umhvørvi
- Lýsið Gryvjuhúsini
  - Eru samanberingar og myndamál? Um ja, vís á dømi.

-Hvat hava børn at siga fyri foreldur?

Áttu børnini í søguni at sagt foreldrunum sannleikan um teirra óhepnu støðu?
Hevði tað verið lættari hjá foreldrunum?
Hava børn lyndi til at fjala trupulleikar og keðiligar hendingar fyri foreldrum?
Hví gera summi børn tað?